## Sjúkrasystir ákærd fyri morð

Ein niðurlendsk sjúkrasystir hevur í rættinum avsannað, at hon skal hava beint fyri fimm børnum og átta eldri fólkum á ymsum sjúkrahúsum í Niðurlondum.

Ákæruvaldið hevur ákært hana fyri at hava beint fyri teimum trettan fólkunum í tíðarskeiðinum frá februar í 1997 til september í fjør. Sambært ákæruritinum gav hon teimum so nógvan doyvandi heilivág, at tey doyðu.

Tað yngsta barnið, sum tann 40 ára gamla sjúkrasystirin skal hava beint fyri, meðan hon starvaðist á ymsum sjúkrahúsum í Haag, var yngri enn eitt ár, og tað elsta fólkið var 91. Í teimum trettan førunum er kvinnan ákærd fyri morð, og í fimm øðrum førum er hon ákærd fyri morðroynd.

## Doyðu av heimabryggi

Ein gøla um heimabryggj hevur skelkað norðmenn. Tveir menn eru deyðir eftir at hava drukkið heimabryggj, og týsdagin varð ein maður lagdur á sjúkrahúsi til viðgerðar fyri metanoleitran.

Løgreglan hevur tikið ein mann, sum hevur viðgingið, at hann hevur selt nakrar dunkar av heimabryggi, og maðurin hevur síðani játtað at hjálpa løgregluni við at fáa fatur á dunkunum við tí vandamikla innihaldinum. Higartil hevur løgreglan funnið millum 160 og 180 litrar av tí vandamikla heimabrygginum, men bryggjarin sigur, at hann hevur selt meiri enn tað.

Upprunaliga stúrdi løgreglan fyri, at matstovur høvdu keypt heimabryggj, men maðurin hevur greitt løgregluni frá, at tað vóru bara privatfólk, sum keyptu frá sær.

## Tapti valóskil

Fyrrverandi amerikanski løgmálaráðharrin, Janet Reno, viðgekk í gjár, at hon hevði tapt uppstillingarvalið hjá demokratiska flokkinum í statinum Florida. Tí verður tað handilsmaðurin Bill McBride, sum skal royna at vinna guvernørvalið ímóti sitandi guvernørinum Jeb Bush, sum er bróður George W. Bush, forseta.

Uppstillingarvalið var fyri átta døgum síðani, men eins og undir forsetavalinum fyri tveimum árum síðani vóru aftur hesaferð trupulleikar við uppteljingini í Florida. Atkvøðurnar í Miami og Broward máttu teljast umaftur fleiri ferðir, og tá avtornaði, fekk Janet Reno 5.000 atkvøður minni enn Bill McBride. Hetta hevur hon nú góðtikið.

Trupulleikarnir við uppteljingini komu óvart á myndugleikarnar í Florida, tí síðani forsetavalið hava teir keypt nýggja útgerð fyri 30 milliónir dollarar. Men tað hevur so ikki víst seg at vera nóg mikið.

## Verða verandi

Russiski forsetin, Vladimir Putin, sigur nú, at teir russisku hermenninir í kekenia verða ikki tiknir heimaftur.

Putin sigur, at hermenninir verða verandi í kekenia, so teir kunnu hjálpa myndugleikunum har at tryggja lóg og landaskil.

– Tað hevði verið skeivt at tikið hermenninar burtur haðani. Fólk doyggja fyri eygum okkara, og yvirgangsmenninir fara ikki úr kekenia við góðum, sigur Putin, ið sum forsætisráðharri sendi russiskar hermenn til Kekenia í oktober í 1999.

# Burturflutt úr Keypmannahavn til Norðurkorea

**Fýra av ellivu japanum, sum norðurkoreanar burturfluttu í sjeyti- og áttatiárunum eru framvegis á lívi í Norðurkorea.**

NORÐURKOREA
*Árni Joensen:*



*– Eg biði japanar og tygum um umbering. Slíkt skal ongantíð henda aftur, segði norðurkoreanski leiðarin, Kim Jung-il, tá hann kunnaði japanska forsætisráðharran, Junichiro Koizumi, um lagnuna hjá teimum ellivu japanunum*

Japanar hava leingi hildið uppá, at norðurkoreansku myndugleikarnir rændu og burturfluttu ellivu japanar í sjeyti- og áttatiárunum. Norðurkorea hevur øll árini víst hesum aftur, men undir samráðingunum við japanska forsætisráðharran, Junichiro Koizumi, týsdagin viðgekk norðurkoreanski leiðarin, Kim Jung-il, at japanski illgrunin var rættur.

– Eg biði tygum og japanar um umbering. Slíkt skal ongantíð henda aftur, og tey seku verða revsað, segði Kim Jung-il, tá hann og Koizumi hittust í norðurkoreanska høvuðsstaðnum Pyongyang.

-– Eg eri skelkaður. Tá eg hugsi um tað, sum skyldfólkunum hjá hesum neyðars fólkum hevur verið fyri, er tað næsta ikki til at fata, segði japanski forsætisráðharrin, sum samstundis lovaði, at tey fýra, sum eru eftir á lívi, sleppa heimaftur.

Á fundinum greiddu norðurkoreanar frá, at teir burturfluttu japanarnir vórðu nýttir til at læra norðurkoreanskar njósnarar japanska málið.

### Rænd í Keypmannahavn

Ein av teimum ellivu japanunum, sum norðurkoreanar rændu og burturfluttu, var Keiku Arimoto. Hon var farin til London at útbúgva seg, men á einari lestrarferð til Keypmannahavnar í 1983 møtti hon nøkrum norðurkoreanskum diplomatum, sum fingu hana at koma við sær til Norðurkorea, har hon skuldi fáa eitt spennandi starv. Kaiku Arimotu var tá 23 ára gomul, og síðani hevur eingin frætt frá henni.

Ikki fyrr enn nú. Navn hennara stendur á tí yvirlitinum, sum norðurkoreanar handaðu japanum týsdagin. Men har stendur eisini, at hon er ikki á lívi longur.

Soleiðis er eisini við Megumi Yokata. Hon var bert 13 ára gomul, tá norðurkoreanar rændu hana og fluttu hana til Norðurkorea í einum kavbáti. Í dag hevði hon verið 38 ár.

Líka síðani burturflytingarnar hevur tað verið eitt fólkakrav í Japan, at myndugleikarnir skuldu fáa greiði á, mhvat varð av teimum ellivu fólkunum. Junichiro Koizumi, forsætisráðharri hevur eisini lovað fólkinum at fáa greiði á málinum.

Tað hevur hann nú fingið.

# Samráðast um vápnaeftirlit

**ST og Irak eru farin undir samráðingar um, nær vápnaeftirlitið kann takast uppaftur**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen:*

Formaðurin hjá ST-vápnaeftirlitsmonnunum, sviin Hans Blix, samráddist í gjár við irakskar umboðsmenn um, nær eftirlitsmenninir hjá ST kunnu fara aftur til Irak at kanna landsins vánagoymslur og -verksmiðjur.

Samráðingarnar vóru í Wien, og aftan á fundin søgdu irakskir talsmenn, at tær verða tiknar uppaftur um tíggju dagar. Fyrr hevur irakski uttanríkisráðharrin, Naji Sabri, sagt, at eftirlitsmenninir kunnu koma aftur til Irak beinanvegin og treytaleyst.

Hans Blix hevur 63 serfrøðingar av ymiskum slagi at hjálpa sær, og sum skilst verða teir fyrstu ætlandi sendir til Irak fyrsta dagin at kanna, um Irak hevur tey kemisku og biologisku hópoyðingarvápnini, sum amerikanarar vilja vera við. Millum teir 63 serfrøðingarnar eru fleiri norðurlendingar.

Amerikanska stjórnin hevur longu gjørt greitt, at hon hevur ikki stórvegis vónir um, at eftirlitsmenninir sleppa at síggja alt, tá teir einaferð koma til Irak.

Fyrrverandi leiðarin hjá eftirlitsmonnunum, sviin Rolf Ekeus, heldur, at ST ella USA eiga senda einar 50.000 hermenn til grannalondini hjá Irak, haðani teir kunnu hjálpa vápnaeftirlitsmonnunum, skuldi tað hent, at irakar leggja teimum forðingar í vegin.

## Til minnis um ommu mína, Agnes Mortensen

Ein kirkja við havið
stendur og lavir,
í myrkrinum skínur
hin lavandi stavur.

Meðan vit tiga
og lýða á støpulin
– høgt hann man riða –
man ósædd hon gleðast
– handandi obolin

Táið í kassa
vit látast at føra hana,
beint við, óansað,
deyðin, tú rør hana

Hostandi hálshvítin
hevur upp hond,
setur sær sjón út um
suðuroyar-rond,
sær ei hvar báturin
leggur at strond

Alt sum við Tvøroyri
tíðinnar hav
tí verðsligu fjøruni
máar burt av

**Agnar**



Spennandi ítróttar- og mentunardagur:

# Samanhald og trivnaður

**– Umframt tann bókliga partin í lestrartíðini eru samanhald og trivnaður kanska tey mest týðandi helt forkvinnan í LFÚ fyri, tá hon setti ítróttar- og mentunardagin í gjár**

TILTØK
*Jan Müller*



*Nøkur av teimum ungu á Vaglinum mikumorgunin*

*Mynd Jens K. Vang*

Í gjáramorgunin varð ítróttar- og mentanardagurin fyri næmingar í miðnámsskúlunum og hægri skúlunum settur á Vaglinum í Havn. Tað var forkvinnan í LFÚ, Turid Christophersen, sum setti dagin. Eftir tað fóru næmingarnir til tey tiltøk teir høvdu valt sær. Og her var nógv at velja í: list, politikkur, sjónleikur, yrkisskriving, tónleikur, aerobics, borðtennis, bowling, bridge, dart, kurvabóltur, fótbóltur, svimjing, talv, tennis og fjølmiðlar. Tiltøkini fóru fram ymsa staðni í Havnini og endaðu á Tórsvølli, har Poul Michelsen handaði heiðursmerki til tey umleið 1200 fólkini úr miðnámsskúlum og hægri skúlum kring landið.

Fyrr hevur dagurin verið hildin sum ítróttardagur men er mentanin nú komin aftrat. Fyrr vóru tað Studentaskúlin og Handilsskúlin, sum skipaðu fyri, men tá var tað so onkur, sum fekk hugskotið at biðja Landsfelag Føroyinga í Útbúgving, sum hevur skrivstovu og fólk, til at taka sær av tiltakinum. Tað hava tey gjørt við gleði og hava brúkt nógva tíð og orku til tess.

Í sambandi við Ítróttar- og Mentunardagin verður konsert í Badmintonhøllini leygarkvøldið 28. september, har ymiskir tónleikabólkar spæla.

Vit prenta her røðuna, sum forkvinnan í LFÚ helt á Vaglinum í gjár:

– Hetta er tann dagurin í okkara skúlaári, har vit sum næmingar kunnu møtast og hugna okkum saman, samstundis, sum vit møtast og koma at kenna hvønn annan. Eru við til eitt tiltak, sum onkusvegna hevur okkara áhuga. Tað er hendan samanseting, sum er reyði tráðurin, fyri ítróttar- og mentunardagin 2002 Landsfelag Føroyinga í Útbúgving er okkara felag. Ert tú lesandi er tað títt felag. Tað hevur til endamáls at virka fyri tínum áhugamálum og fyri at betra um korini hjá tær.

Tá vit hugsa um okkara lestartíð, og hvat vit fáa tíðina at ganga við, er ein partur tann bókligi – skúlating. Her kenna vit nokk okkum øll aftur, men vit skulu ikki gloyma mest umráðandi partin – samanhaldið.

Hetta er parturin, ið er við til at skapa trivnað. Hava vit ikki tað, verða okkara lestarár minni hugalig – fyri ikki at siga ótolandi. Hetta er tí eisini ein partur, sum LFÚ hugsar um.

Og hevur tí valt at skipa fyri ítróttar- og mentunardegnum í ár. Tað merkir, at næmingar frá øllum skúlum í Føroyum, á ein ella annan hátt hava haft ávirkan á dagin, ein patur av hesum næmingum hava, dag og nátt í longi tíð, kýtt og strekt seg fyri at fáa leysu og føstu endarnar til tiltakið at hanga saman.

Er fari at enda við byrjani, og við hesum siga takk til øll sum hava gjørt tiltakið møguligt. Havið ein góðan dag.



*Turid Christophersen, forkvinna í LFÚ setir ítróttar- og mentanardagin á Vaglinum í Havn*

*Mynd Jens K. Vang.*


Far á flog...



**Frá nú av** og til 9. desember 2002 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur.
Forsølan er til 2. desember 2002. Treytin er at tvey ferðast saman.
Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**Føroyar - Keypmannahavn og aftur 1)**
Fyri hvønn
**2165,-**
íroknað ferðaavgjald
**Børn 0-1 ár: -90% 0-1 ár við setri: -50% 2-11 ár: -50%**

**Føroyar - Billund og aftur 1)**
Fyri hvønn
**2203,-**
íroknað ferðaavgjald
**Børn 0-1 ár: -90% 0-1 ár við setri: -50% 2-11 ár: -50%**

*1) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Ferðin kann í mesta lagi vara 1 mánað. Minst tvey skulu ferðast saman, tann eini kann vera eitt barn 2-11 ár. Víðari til Århus ella Odense +200,- t/r.*

MAERSK AIR

petur og petur 320 870